# Tá ið bretar vunnu kapp

Ófrættadámurin var stórur, tá ið tað spurdist, at týskarar høvdu hersett Danmark. Talan var um ikki sørt av politiskum turbolensi um hetta mundið, og tað kendist sum stórur lætti, tá ið bretar 12. apríl í 1940 komu á land í Havnini, og Føroyar harvið vórðu hersettar og innrættaðu seg til nýggjar tíðir

FYRI 65 ÁRUM SÍÐANI

*Jóannes Hansen*

Tey eru farin upp um pensiónsaldur, sum minnast, tá ið Føroyar vórðu hersettar. Hjá teimum, sum upplivdu hersetingina og tað, sum fyrifórst hesar dagarnar fyri 65 árum síðani, man hetta standa neglt fast í huganum. Tíbetur hava Føroyar og føroyingar ikki síðani upplivað herseting, og vónandi fer ein sovorðin støða ikki at koma í aftur nakrantíð.

Tað er gott og sunt av og á at spola aftur og at verða mintur á, hvussu tað áður hevur gingið landi og fólki. Nú 65 ár eru liðin síðani bretsku hersetingina verður róð aftur á aftur tað, sum fyrifórst í Føroyum í hesi vikuni fyri sekstifimm árum síðani.

Keldan er brot úr fyrsta bindi í Løgtingið 150 ár, sum Hans Andrias Sølvará, søgufrøðingar og heimsspekingur, hevur skrivað, og sum er vísindaligt dygdarverk, ið varð útgivið í 2002. Harafturat havi eg við stórum áhuga aftur lisið fyrsta bindið í bókarøðini um stríðsárini hjá Niels Juel Arge, fyrrverandi útvarpsstjóra, sála. Bókin varð útgivin í 1985, og í fororðunum tók Niels Juel, sum undan, at hann fór undir bókarøðina, hevði havt sendirøð um henda spurningin í Útvarpinum, millum annað soleiðis til um, hví hann fór undir bókarøðina um stríðsárini: "Umleið 40 ár eftir at 2. heimsbardagi brast á, vóru fleiri fallin frá, sum vóru við í ymiskum, sum hendi undir stríðnum. Hetta gjørdi, at eg í 1981 fór undir sendirøðina "Stríðsárini" fyri at savna so nógvar frásagnir um hetta tíðarskeiðið, sum til bar".

Við útvarpssendingunum og serliga bókarøðini syrgdi Niels Juel Arge fyri, at bæði tað, ið hann sum ungur í høvuðsstaðnum um hesa tíðina var vitni til, og tað, sum so mangir aðrir føroyingar upplivdu bæði heima og burturi, er vorðið atkomuligt saman við úrslitum av skjalarannsóknum og kanningum av, hvat varð sagt og skrivað um hesa tíðina heima og burturi.

Tað er upplagt, at føroyingar vita um, hvussu tað gekk fyri seg, tá ið Føroyar vórðu hersettar fyri 65 árum síðani, og hvussu føroyingar upplivdu krígsárini, bæði heima og burturi og á landi og sjógvi. Í tí sambandinum eru bøkurnar hjá Niels Juel Arge, sála, um krígsárini ógvuliga hentar og lættar at lesa.

### Ikki heilt óvæntað

Tá ið bretar fríggjadagin 12. apríl í 1940 komu á land í Havnini, var tað ikki púra óvæntað, og sum heild kendist tað sum ein lætti. Danmark varð hersett 9. apríl, og dagin eftir visti BBC útvarpið at siga, at leysaøgur gingu í London um, at Týskland ætlaði sær at seta herfólk á land í Føroyum.



*Winston Churchill boðaði 11. apríl frá í Undirhúsinum, at nú fóru bretar at herseta Føroyar*

Tá hevði bretski flotaadmiralurin, Winston Churchill, longu sama dag givið admiralitetinum boð um at herseta Føroyar skjótast gjørligt.

Týskvøldið 9. apríl - sama kvøldið sum týskararnir tíðliga á morgni høvdu tikið Danmark - fekk Hilbert, amtmaðurin, vitjan av bretska konslinum, Valdemari Lützen. Hann kom við boðum frá bretsku stjórnini um, at hon fór at forða týskari herseting av Føroyum, og til hetta endamálið fór hon at "require facilities in the islands". Og Niels Juel sigur, at amtmaðurin svaraði í samráð við formannin í løgtingsins landsnevnd, Andrass Samuelsen, at hann gekk við til at veita "facilities".

Løgtingsformaðurin fekk eisini at vita av, og allir tríggir vóru teir samdir um ikki at siga Løgtinginum frá, tí so fór ikki at bera til at dylja bretsku ætlanina.

Kristian Djurhuus var løgtingsformaður. Niels Juel endurgevur, hvussu hesin týsdagurin, tann 9. apríl, var upprunnin fyri honum. Gunnar Dahl-Olsen, sum var sýslumaður í Streymoy og búði í Vestmanna (hann var abbi Óla Breckmann) ringdi kl.7.30 í gistirúmið hjá Kristiani Djurhuus í høvuðsstaðnum. Hann var - umframt at vera løgtingsformaður - eisini sýslumaður í Suðuroy. Gunnar var semingsmaður, og teir báðir, Kristian og Gunnar, høvdu langt út á náttina verið til samráðingar við partarnar í fiskimannaverkfallinum, sum var av 10. apríl - alla staðni uttan í Suðuroy.

- Eg dugi ikki sjálvur at siga frá, hvussu man reagerar, tá man fær sovorðið at vita. Eg lat meg í og fór oman í Tinghúsið. Har vóru komnir nakrir tingmenn, og Gunnar var eisini har. Allir vóru líka bilsnir og føldu seg sjokkeraðar. So kom amtmaðurin Hilbert eisini hagar. Hann kundi bara vátta, at hann, tá ið hann frætti um hersetingina, hevði roynt at fáa samband við ríkisstýrið, og tá ið hann hevði fingið tað, varð kvett, og hann fekk einki burtur úr tí.

- Har stóðu vit. Ein spurdi seg sjálvan, hvat nú skuldi henda, og vit spurdu hvønn annan, hvat nú var at gera. Ongin planur fanst, ongin hevði hugsað um møguleikan, at sambandið millum Danmark og Føroyar skuldi verða kvett av krígsávum, segði Kristian Djurhuus.

11. apríl helt Winston Churchill, flotamálaráðharri, røðu í Undirhúsinum, har hann greiddi frá, at tað ráddi um hjá bretum at vera undan týskinum at herseta Føroyar, tí tær kundu á týskum hondum gerast ein sera álvarsom hóttan móti Bretlandi, ikki minst ímóti skipasambandinum vestur um hav til Amerika, sum týskurin við ídni søkti at við kavbátum. Tað var eisini neyðugt hjá Bretlandi at taka Ísland undir sína verju, segði Churchill, sum í røðu síni gav lyfti um, at bretar fóru at verja Føroyar móti øllum harðskapi, ið kundi at standast av krígnum.

### Hersetingin

Stutt eftir middag fríggjadagin 12. apríl komu tvey stór grá bretsk skip inn um Borðuna við rættiliga stórari ferð og stevndu móti Havnini. Tað lætnaði um mangt hjarta, at tað ikki var týskurin, sum var komin.

Niels Juel hevði m. a. sína egnu dagbók at halla sær at, tá ið hann greiddi frá, og hann er nágreiniligur, tá ið hann sigur frá landkomuni hjá bretunum:

Kl. 13.30 kom bátur í land við tveimum yvirmonnum. Teir komu upp á land á trappuni undir keikioskini. So at siga einki fólk var statt har, men Andreas Ziska fór ímóti teimum og beyð teimum vælkomnar og segði, at hann og ein partur av Føroya fólki ynsktu sjálvræði - want to governe ourselves. Meðan teir nú fylgjast inn eftir keiuni uttan at bretarnir siga nakað, møta teir einum politisti, sum rekur Andreas Ziska burtur. Longur inni á koyrikeiuni, sum tað tá varð rópt, møta teir einum bili við bretska konslinum Valdemar Lützen og soni hansara Mogens, ið var varakonsul. Teir fara nú út í Tinganes eftir hinum bretska varakonslinum, Robert Brockie, og koyra út í Rættará til Valdemar Lützen, men steðgurin er stuttur. So gongur leiðin niðan til amtmannin. Har var Kristian Djurhuus, løgtingsformaður, staddur saman við Hilbert amtmanni.

Bretsku yvirmenninir váttaðu á hesum fundi tað, sum Churchill hevði sagt í undirhúsinum ígjár, at Bretland hevði átikið sær at verja Føroyar og lata tær aftur til eitt frælst Danmark. Nú bretsku herskipini lógu á vánni bóru bretsku yvirmenninir fram ynski um at farið varð undir fyrireikingar til at taka ímóti umleið 250 hermonnum í Havn og á Skálafirði ímorgin, at skipað varð fyri censuri av telegrafi, tráðleysari telefon og at sendingar av brævaposti verða steðgaðar. Amtmað-




*Útgerðin hjá Royal Marines varð koyrd av keiuni í lastbili hjá Valdemar Lützen, sum var bretskur konsul*